Løgtingslóg

um

broyting í løgtingslóg um afturbering av útreiðslum til filmsframleiðslu í Føroyum
(Broyttur fíggingarleistur og lógartøkniligar rættingar)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 170 frá 20. desember 2017 um afturbering av útreiðslum til filmsframleiðslu í Føroyum verða gjørdar hesar broytingar.

1. §§ 1-2 verða orðaðar soleiðis:

"**§ 1**. Fyri filmar, sendirøðir og heimildarfilmar, sum verða framleidd í Føroyum, verða 25% av útreiðslunum, sum eru hildnar í Føroyum, afturbornar, um umsøkjarin lýkur treytirnar fyri at fáa afturbering. Afturberingin er í mesta lagi 5 milliónir kr., sbr. tó stk. 2.
Stk. 2. Fer afturberingin upp um 5 milliónir kr., kann upphæddin, ið er oman fyri 5 milliónir kr., berast aftur, um játtan til hetta fæst til vegar á løgtingsfíggjarlógini.
Stk. 3. Í seinasta lagi 15. august á hvørjum ári letur Filmshúsið landsstýrismanninum eina skikkaða meting av verkætlanum, sum væntandi verða framdar í komandi fíggjarári.

§ 2. Afturbering eftir § 1 kann verða latin filmum, sendirøðum ella heimildarfilmum, sum heilt ella partvíst verða framleidd í Føroyum, og sum eru ætlað almennari útbreiðslu.
Stk. 2. Lýsingar, tíðindi, veruleikasendingar, undirhaldssendingar og ítóttasendingar hava ikki rætt til afturbering eftir hesi løgtingslóg."

2. § 6, stk. 1, litra a og b, verður orðað soleiðis:
"a) Framleiðslan skal vera við til at menna listarliga og tøkniliga vitan og førleikar í filmsvinnuni í Føroyum.
b) Fíggjarætlanin fyri framleiðsluna skal vísa, at í minsta lagi 500.000 kr. eru brúktar til útreiðslur, sum eru fevndar av § 8."

3. § 6, stk. 2, verður orðað soleiðis:
"*Stk. 2*. Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um, at fakfólk og førleikar í Føroyum skulu brúkast í framleiðsluni, sbr. stk. 1, nr. 1."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. oktober 2023.

Samtykt á Løgtingi hin 15. mai 2023 við 27-0-0 atkvøðum.

formaður

/

/

skrivari

Borið saman við samtykta løgtingslógaruppskotið og funnið beint.

Á LØGTINGI, 15. mai 2023

stjóri

LM-095/2022